## Til Íslands at arbeiða

Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár hava 130 útlendskir ríkisborgarar fingið loyvi at arbeiða í Íslandi, og tað er á leið sama tal sum í fyrsta ársfjórðingi í fjør. Men hetta samsvarar ikki við tað, sum arbeiðsgevararnir siga, tí teirra uppfatan av støðuni er, at tørvurin á fremmandi arbeiðsmegi er minkandim, og at hann fer ikki at veksa aftur í hesum árinum. Arbeiðsgevararnir halda tí, at tað man vera skrásetingin, sum virkar betur nú.



## Baugur til Asia

Hóast stórar trupulleikar í seinastuni hevur íslendska stórfyritøkan Baugur Group framvegis stórar ætlanir og víðan sjónarring. Í samrøðu við amerikanska sjónvarpið CNBC sigur Jón Ásgeir Jóhannesson, nevndarformaður, at fyritøkan hyggur alla tíðina eftir nýggjum møguleikum, og hann nevnir í hesum sambandi Kina og India sum sera spennandi marknaðir hjá fyritøkuni. Harafturat er fyritøkan í stórari menning í Russlandi.

*Jón Ásgeir Jóhannesson er nevndarformaður í Baugur Group*

*Mynd: Vísir*

# Enki eftirlit við skipunum



TRYGD Á SJÓNUM
*www.samtak.fo*

Eftirlitið við trygd á sjónum er so sum so. Tað er ov sjáldan, um ikki ongantíð, at eftirlit er við, at trygdarásetingar verða hildnar, at kanningar eru av arbeiðsumhvørvinum umborð, at viðurskiftini viðvíkjandi heilsuváttan og trygdarásetingum verður hildin og so víðari.

Tað skrivar www.samtak.fo

Tað er Skipaeftirlitið, sum hevur ábyrgdina av hesum, men eftirlitisvitjanir umborð á skipunum eru sera sjálvsamar.

- Mær vitandi kemur tað nærum ikki fyri, at skipaeftirlitið fer á fráboðað ella ófráboðaðar eftirlitisvitjanir. Vit hoyra frá manningum um alskyns brot á trygdarviðurskiftini, uttan at stórvegis verður gjørt við tað, og tað má broytast, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum við www.samtak.fo

Sjálvur vónar hann, at nýggi sjórin á Skipaeftirlitinum fer at raðfesta trygd á sjónum frammarlaga, og at eftirlitisvitjanirnar umborð verða títtari.

- Tað eru alt ov nógvar álvarsamar vanlukkur umborð, men høvdu krøvini til trygdina verið herd og eftirlitið økt, var talið á óhappum fækkað, vísir Jan Højgaard á.

Umframt at økja um eftirlitið á skipum er eisini neyðugt at fáa eina nýggja vanlukkutryggingarlóg. Verandi lóg er frá 1960'unum og er langt síðani vorðin ótíðarhóskandi. Eitt nú eru endurgjøldini fyri álvarsamar arbeiðsskaðar alt ov lítil, og tað gongur ov long tíð, áðrenn ávegis endurgjald og endaligt endurgjald verða ásett.

Feløgini í Samtak hava heitt á løgtingið um at fáa samtykt eina nýggja vanlukkutryggingarlóg sum skjótast umframt at styrkja Arbeiðseftirlit og Skipaeftirlitið, skrivar heimasíðan hjá Føroya Fiskimannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.



# Gott ár hjá Havsbrún

FISKIVINNA
*Vágaportalurin*
*www.vagaportal.com*

Havsbrún í Fuglafirði hevði eitt gott ár í fjør. Umsetningurin var 685 milliónur krónur í 2007, og úrslitið eftir skatt var 55.5 mió. krónur.

Tað skrivar Vágaportalurin, www.vagaportal.fo

Úrslitið eftir skatt var í 2006 57,5 milliónir krónur, og tá var umsetningurin 573 milliónir krónur, so árið 2007 gav ein vøkstur í umsetninginum í mun til 2006 upp á 112 milliónir krónur ella knøpp 20%.

Í lønum var útgjaldingin 40 milliónir krónur í 2007 til tey 100 starvsfólkini, sum starvast á Havsbrún. Goldin skattur var 12 milliónir krónur í 2007 aftur ímóti 8 milliónir krónur í 2006.

Bergur Poulsen, stjóri í Havsbrún, sigur við Vágaportalin, at árið 2007 var eitt gott ár, og tað gekk væl.

- Vit kláraðu at stýra millum skerini, tí á mangan hátt var 2007 eitt turbulent ár við stórum sveiggjum á rávøruprísinum, sigur stjórin.

Og viðvíkjandi árinum í ár, sigur Bergur Poulsen, at Havsbrún væntar minni rávøru í ár, og er tað tí, at svartkjafturin verður minni í ár.

Í 2007 tók Havsbrún móti 250.000 tonsum í rávøru.